# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800





*Kári á Høvdanum setti nýtt føroysk met í 200 m rygg*

# Kári setti føroyskt met

**Kári á Høvdanum setti fyrrapartin nýtt føroyskt met í 200 m rygg. Hann er rímiliga væl nøgdur, hóast tíðin ikki rakk til pláss í hálvfinaluni**

SVIMJING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Kári á Høvdanum visti longu áðrenn innleiðandi kappingarnar í 200 m rygg, at oddsini fyri plássi í hálvfinaluni vóru ikki tey bestu. Heili 34 svimjarar høvdu tilmeldingartíðir undir tveir minuttir og 10 sekund. Føroyska metið hjá Kára á Høvdanum er 2:14:10. Tí var Kári á Høvdanum eisini plaseraður úti á geil-2.

Men Kári á Høvdanum svam sín møguleika í morgun og legði út við góðum starti. Tíðliga fór ísrelski svimjarin Jonathan Kopelev frá hinum, og hann helt tørn allan vegin á mál, eini fimm sekund frammanfyri føroyska svimjaran. Tíðin hjá Kára á Høvdanum var tó somikið góð, at hann barberaði hálvt annað sekund av føroyska metinum, og kom á mál við tíðini 2:12:62.

- Sjálvandi eri eg glaður fyri at hava sett nýtt, føroyskt met. Men eg hevði nú ætlað at fingið tíðina eitt sindur longur niður, segði ein væl nøgdur Kári á Høvdanum beint eftir kappingina, og legði afturat:

- Nú er 200 m rygg ikki tann greinin, ið eg venji mest. Tí hevði eg ikki stórvegis vónir um at svimja meg í hálvfinaluna. Men hetta var samanumtikið í lagi.

- Nei, tað hevur hann ikki gjørt so nógv við, sammett við hinar greinarnar, og tí vóru vónirnar heldur ikki tær bestu í morgun. Men hetta er ein grein, ið eg royni at fáa hann at gera meira við, sigur Petur Heðin á Fløtti.

Landsliðsvenjarin og persónligi venjarin hjá Kára á Høvdanum var somuleiðis rímuliga væl nøgdur.

- Kári byrjar sera væl, men er eitt lítið sindur ov seinur eftir fyrstu 50 metrarnar. Og síðani heldur hann eina eitt lítið sindur ov lága ferð restina av teininum. Men sjálvandi er tað deiligt at hann tekur føroyska metið, sigur Petur Heðin á Fløtti.

Sekstan svimjarar svumu seg í hálvfinalurnar í 200 m rygg, sum verða seinnapartin. Besta tíðin var 2:02:12, og hinir 15 svumu allir teinin undir tveir minuttir og sjey sekund.

## Orienteringin

Kári á Høvdanum hevði bara tveir dagar at fyrireika seg til uttandura, 50 metra hylin á Tasmajdan stadion í Beograd áðrenn fyrstu kappingina mikudagin. Um tað var orsøkin til, at hann tá misti orienteringina og tók í banatogið ber bara til at gita um. Í dag var hann tryggari við hylin og orienteringin tóktist vera komin uppá pláss.

- Jú, tað riggaði betur í dag, staðfestir Kári á Høvdanum, sum kennir seg tryggan til seinastu avbjóðingina í morgin.

Ryggsvimjarar meta seg vanliga eftir loftinum í svimjihøllini, men tað ber av góðum grundum ikki til, tá svomið verður undir opnum himli.

## Góðar vónir

Seinasta avbjóðingin hjá Kára á Høvdanum er 50 m rygg, ið má metast at vera hansara sterkasta grein. Innleiðandi kappingarnar eru leygarmorgunin.

- Eg eri væl fyri til kappingina í morgin, og vónirnar eru góðar. Málið er at svimja meg í hálvfinalurnar, sigur Kári á Høvdanum.